

# Oljurisi fimm mia. dollarar í kassan

Deil:

**Jan Müller**

02.08.2014 - 18:49

Oljan.fo

Tað gongur væl hjá amerikanska oljufelagnum Chevron. Felagið hevur júst almannakunngjørt roknskapin fyri fyrra hálvár, og vísti hann, at avlopið hesar seks mánaðirnar var 5,67 milliardir dollarar. Tá er skatturin farin av.

Úrslitið er júst 300 milliónir dollarar betri enn í sama tíðarskeiði í 2013.

Avlopið svarar til 2,98 dollarar fyri hvørt partabræv, og sambært Bloomberg News var tað betri, enn greinarar høvdu roknað við. Teirra meting var 2,90 dollarar fyri hvørt partabræv, og úrslitið gjørdi esini, at virðið á partabrævinum vaks.

Chevron er triðstørsta oljufelag í heiminum.

Felagið er eisini sera virkið eystan fyri Føroyar. Tað er fyristøðufelag á Rosebank kelduni, sum liggur tætt við føroyska markið og sum helst verður útbygd. Fyri fáum árum síðani var Chevron eisini partur av føroysku leitingini. Tá var tað við í Súla Stelkur leitiloyvinum, sum verður borað í løtuni. Tað tók seg tó úr aftur hesum loyvinum fyri fárum árum síðani.

Chevron er so eisini við í útbyggingini av risastóru oljukelduni Clair eystan fyri føroyska markið.